*Framhald av síðu 15*

kyndu, tey eru jú hinkynd og vilja altið gifta seg. Tey vilja ikki gevast við at gifta seg, tí at samkynd vilja giftast. At samkynd vilja giftast er ongin hóttan móti tí vanliga hjúnalagnum. Samkynt ynskja bara at vera saman við teimum, sum eru samkynd. Vit ynskja heldur ikki, at fleiri gerast samkynd, tað er móti tí, eg gangi inn fyri, at vera tað tú ert og einki annað, sigur Bogi Davidsen.

– Tey hinkyndu, sum kenna Søren og meg eru ofta ómetaliga glað fyri okkum og kenna ikki okkum sum eina hóttan móti teimum. Eg trúgvi, at tey hinkyndu óttast fyri hjúnabandinum, tí tað verður tosað so nógv um, at alt er í upploysningi. Vanliga hjúnabandið er við at loysast upp, og tað er ein heilt annar trupulleiki. Fyrr var føroyska samfelagið meira bundið kristiliga at eindarmentanini í kirkjuni. Nú eru fleiri kirkjur og sektir og ikki kristiligar sektir og fólk, sum ikki eru trúgvandi. Samfelagið er meira sekulariserað.

– Tað vit samkyndu ynskja við skrásetta parlagnum er, at tey juridisku viðurskiftini eru í lagi. Vit vilja bara hava somu rættindi sum hini fólkini í samfelagnum. Tað eru tvær grundir til at fólk giftast. Onnur er at fólk eru góð við hvørt annað. Hin orsøkin er, at um ein verður skildur ella doyr, so er tað juridiska í lagi.

*– Hava kristin rætt at døma meg sum samkyndan, so havi tey eisini rætt at døma tey sum blíva skild, og tey sum nokta teimum at giftast aftur, tey sum fáa børn uttan fyri hjúnalag*

## Kirkjan ikki búgvin

– Í einum kirkjuligum hjúnabandi skal man eisini hava vælsignilsi. Tá vit ynskja skrásett parlag í Føroyum, so er hetta ynskið ikki við. Hetta kemst av, at kirkjan enn ikki er búgvin til slíkt stig. Summir prestar geva vælsignilsi, men vilja ikki gifta fólk. At prestar geva vælsignilsi verður brúkt nógvastaðni, bæði í Noregi. Svøríki og Danmark.

Fyrsta stigið má vera í einum demokratiskum samfelagi við trúarfrælsi, at vit hava trúarfrælsi, og at allir borgarar hava somu rættindi og skyldur sum onnur óansæð trúgv ella ei. Skyldurnar hjá teimum samkyndu eru tær somu sum hjá hinkyndum, men rættindini eru ikki tey somu.

– Tekur tú mannarættarlógina, so nevnir hon tíðiliga bæði hjá ST, í nýggju mannarættindalógini hjá ES og í nýggju grundlógini í Suðurafrika og í Írlandi, at tað skal ikki gerast mismunur, millum kyn, millum fólkasløg, politiska áskoðan, átrúnað og kynsliga ábending.

– Orðini kynslig ábending er knúturin heima í Føroyum. Tað má standa í okkara lóg, tí um vit ikki tora at nevna tað, so eru tey samkyndu ikki eins væl vard sum hinir minnilutarnir í samfelagnum. Vit samkyndu eru ein minniluti, vit hava somu rættindi at blíva nevnd sum aðrir minnilutar, eitt nú tey við ørvísi húðaliti og tey sum hoyra til fundamentalistiskar sektir ella trúarbólkar. Í 1988 reyk landstýrið uppá, at tað ikki var loyvt at gera mun á manni og kvinnu og samkyndum. Tað var bara Karin Kjølbro, sum tordi at atkvøða fyri. Hinir í løgtinginum tordu ikki. Hetta er tíbetur broytt í dag, nú er ikki loyvt at gera mun á manni og kvinnu, hóast tú saktans kann finna grundarlag í bíbliuni fyri muni millum kynini. Tey samkyndu eru ikki gloymd av politikkarunum, men goymd burtur, tí polittikkararnir ikki tora at gera nakað við trupulleikan.

– Fleiri av teimum landsstýrismonnum og løgtingsmonnum, eg havi tosað við, siga: Bíða Bogi, fólkið er ikki búgvið enn. Men tað nyttar lítið at siga, at fólkið er ikki búgvið, um politikkararnir ikki tora at tosa um tað. Politikkarin torir ikki at tosa um trupulleikan, tí so verður hann ikki valdur inn aftur. Tí haldi eg tað er djarvt av Høgna Hoydal, at hann stendur sum ein maður, nú løgtingið skal taka støðu til parlagið, men vit vilja nevnast óansæð um landsstýrið fellur sum tað gjørdi í 1988, sigur Bogi Davidsen.

## Bíðað í 30 ár

Hvør skal so verða fyrst búgvin, politikkarin ella fólkið?

– Eg veit ikki, nú havi eg so bíðað í 30 ár og tað gongur framá. Í 1988 var tað bara ein, sum tordi at atkvøða fyri, at ikki munur varð gjørdur millum kynini, og sum eg síggi í bløðunum, so eru tað nú sjey løgtingsmenn, sum tora at atkvøða fyri, og 11 sum enn ikki hava tikið støðu til, at vit samkyndu fáa eins rættindi. Her er talan um framstig, sjálvt um framstigið, sætt frá okkum samkyndu, ikki er serliga nøktandi. Men talan er kortini um framstig og kanska fer at ganga enn betri í framtíðini. Føroyingar síggja meira til samkynd í dag gjøgnum sjónvarpið, samkynd eru í næstan hvørjari sending, í filmum og tjaki og so víðari. Føroyingar mugu finna útav, hví teir eru móti samkyndum. Teir flestu føroyingar kenna ongan samkyndan, men eru bara í móti tí. Tey sum kenna meg siga: »Bogi, men tú er bara so almindiligur.« Tað er ikki nokk at siga tað, tí vit samkyndu, vit eru so nógv onnur.

– Eg haldi, tað er nokk so løgið, at samkynd eru ein trupulleiki í Føroyum, tá eg hugsi um, hvussu væl Sørin og eg verða móttiknir heima. Familjurnar hjá okkum báðum hava eitt fínt forhold og øll í míni familju halda nógv av Sørin. Eg haldi, at í Føroyum er tað soleiðis, at samkynd, sum tora at viðurkenna, at tey eru samkynd, verða betri told, sigur hann

## Ein lætti at viðurkenna

– Í 1972 skrivaði eg eitt longri bræv til foreldrini, systkini og vinfólkini um, at eg var samkyndur. Tað er nokk tað mest týdningarmikla, eg havi gjørt í tilveruni. Also doktararitgerðin, karrieran og allarfyrst læknaútbúgving vóru týdningarmiklar. Men menniskjaliga sæð, so er tað nokk tað besta eg havi gjørt móti mær sjálvum, at játta hvar eg hoyrdi heima kynsliga. Við tí viðurkendi eg meg sjálvan sum eg eri og einki annað. Um hetta mundi var tað nokk so nógv frammi í tíðini at viðurkenna seg sjálvan sum ein er. Eg læs nógv um eksistentialismu um hetta mundi. Eg læs Sartre, Camus, Kierkegaard og aðrar.

– Moralska grundarlagið hjá mær er gott. Eg eri uppvaksin við einari kristnari siðalæru, útbúgvingarliga er tað eisini í lagi, og eg eri líka góður sum øll onnur. Eg meini eisini, at øll onnur føroysk samkynd eru tað sama, uttan mun til útbúgving ella hvar tey koma frá.

## Samkyndir landsmenn

Bogi er ein miðdeplunum fyri samkyndar føroyingar í Danmark. Mong eru tey sum hava torað at greitt honum frá, hvussu tey hava tað, júst tí hann hevur torað at stigið fram og greitt frá síni støðu. Hann hevur ongantíð skammast um sína kynsligu ábending. Hann droymir um, at føroysk samkynd einaferð fara at taka seg saman í eitt felag. Men hann vil ikki vera við til at stovna eitt slíkt felag, fyrr enn limirnir í tí tora at stíga fram og viðurkenna alment, at teir eru samkyndir. Bogi heldur ikki at samkynd eiga at goyma seg, men hann skilir væl, at føroysk samkynd eru bangin fyri at trína fram, hugsar mann um, hvussu illa tey verða told í Føroyum.

*Bogi hevur ilt við at skilja fundamentalistisku grundgevingina í Føroyum og skilir ikki rættuliga hví tað er so umráðandi hjá fundamentalistunum at taka sær av málum, sum bara hoyra Gudi til*

– Eg minnist, tá føroysk samkynd møttust fyri fyrstu ferð í Danmark fyri nøkrum árum síðan, eg haldi vit vóru 19. Tað var stuttligt og deiligt. Tey komu úr Klaksvík, úr Suðri, úr Sandoynni, úr Vágum, úr Eysturoynni o.s.v. Tey høvdu ymiskar útbúgvingar, tey høvdu ymiska bakgrund. Tað var øgiliga spennandi at vera saman og so bara tosa føroyskt. Tað hevði eg ikki gjørt í mong harrans ár. Eg og Rólant Samuelsen, vanliga kallaður Salong Rólant, vóru vinmenn. Rólant var eitt sovorið menniskja, sum øll kendu og hann var ikki bangin fyri at viðurkenna sína kynsligu ábending. Hann var eitt fantastiskt menniskja, dugnaligur og stuttligur. Hann var so deiliga opin og tordi at siga sum var. Við mínari bakgrund í læknaliga umhvørvinum, havi eg verið meira varin og kanska ov varin. Men hóast eg ikki havi verið so fríborin sum eitt nú Rólant, so vil eg hava viðurskiftini broytt í Føroyum. Eg vil fegin vera við til at fáa viðurskiftini broytt, soleiðis at vit samkyndu fáa tað betri í Føroyum, sigur hann.

## Forelskilsi

Samkynd uppliva akkurát sama forelskilsi sum hinkynd. Tey kunnu blíva góð við hvønn annan og ynskja at liva saman. Kærleikskenslurnar eru akkurát tær somu sum millum mann og kvinnu. Eg haldi, tað ber til at samanlíkan hjúnaband millum samkynd við hjúnaband millum barnleys hjún. Tey eru jú góð við hvønn annan og vilja ofta halda fram við at liva saman, sjálvt um tey ikki fáa børn.

– Summi kristin samkynd ynskja eisini eina vælsigning frá kirkjuni ella frá tí samkomu tey hoyra til. Í framtíðini má tað so verða uppgávan hjá kirkju og samkomunum at laga tað soleiðis, at hesi eisini kunnu fáa vælsignilsi.

## Kirkjan broytist

– Tað er so nógv broytt í samfelagnum og innan fólkakirkjuna seinastu árini. Fyrr máttu kvinnur ikki úttala seg alment í samkomun og slett ikki sum prestar, men í dag hava vit kvinnuligar prestar. Bíblian talar í móti kvinnuligum prestum, men teir eru heilt lógligir í dag, sjálvt um onkur prestur í Føroyum ikki góðtekur tað enn. Bíblian talar í móti samkyndum, men fyri tað eru samkynd ein veruleiki.

– Tey, sum eru fundamentalistiskt trúgvandi í Føroyum, halda seg til orðið í Mósubók og hjá Paulusi og ikki til restina av bíbliuni. Serliga hava tey hug at gloyma Jesu orð um næstakærleika. Jesus fordømir slett ikki okkum samkyndu og minnir okkum á um nakar er so reinur, at hann kann kasta fyrsta steinin. Og hava vit ikki øll okkurt, sum vit kundu broytt, áðrenn vit døma onnur?

– Eg og Sørin hava livað í skrásettum parlag, síðan lógin kom í gildi í Danmark fyri 12 árum síðan. Vit eru báðir limir í fólkakirkjuni og kundu fingið kirkjunnar vælsignilsi frá onkrum presti sum gongur inn fyri tí. Men eg haldi, at tá eg nú í so mong ár havi stríðst fyri rættindunum hjá okkum samkyndu, so hevði eg ikki viljað fingið kirkjunnar vælsignilsi, um tað ikki var frá einum presti, sum veruliga meinti tað. Ikki bara tí at honum varð hetta álagt av lógini tildømis, sigur Bogi

– Eg livi í einum demokratiskum samfelag og tað er álitið hjá mær , at eg livið í einum slíkum. Okkara demokratiska samfelag byggir á kristna grundarlagið og mín máti at liva upp á byggir eisini á kristna grundarlagið og tað haldi eg er í lagi. Fyri meg hevði tað verið heilt rímuligt, um eg fekk eina signing frá kirkjuni eisini, sigur hann

*– Eg var við til at stovna ráðgevingina fyri samkynd í Danmark í 1975, so eg havi verið við leingi, sigur hann.*
*Bogi vil ikki liva í einum landi, sum ikki góðtekur, at hann er samkyndur, og at hann livir í skrásettum parlag. Hann vil ikki liva í einum landi, sum ger mun á samkyndum og hinkyndum. Tað er ein av orsøkunum til at hann ikki býr í Føroyum. Ikki tí, starv hevði hann fingið, honum stóð í boði at gerast læknastjóri í Føroyum og hann hevði eisini kunna arbeitt sum yvirlækni í Føroyum*

## Adoptera

– Eg haldi eisini, at tað hevði verið rímuligt, at vit samkyndu kunna adoptera børn eins og onnur. Eg og Sørin hava tað gott kensluliga og materielt, at vit kundu saktans átikið okkum av verið foreldur fyri børn, men tað ber heldur ikki til. Eg havi ein vinmann í Noreg, sum er pápi til eitt barn hjá eini samkyndari konu, og tað gongur fínt. Men nú eru vit somikið til árs, at vit heldur vilja vera nakað fyri børnini hjá okkara systkjum, sigur Bogi smílandi.

– Vit samkyndu hava tað gott í Føroyum á tann hátt, at vit verða ikki beinleiðis forfylgd likamliga. Men hugsa tær støðuna hjá ungum samkyndum heima, sum ikki tora at fortelja foreldrum, systkjum og vinum, hvussu tey eru háttað, av ótta fyri at tey ikki blíva góðtikin.

## Fólkaskúlin

– Eg haldi, tað liggur ein








*Bogi aftast og Søren fremst avmyndaðir í summarhúsinum seinasta leygardag*

*Mynd: Jústinus Leivsson Eidesgaard*

stór ábyrgd á fólkaskúlanum at kunna næmingarnar um tað at vera samkynd. Tað kanska sita eini tvey ella trý í hvørjum flokki í Føroyum, sum einaferð fara at sanna, at tey eru samkynd. Tað er ov vánaligt í dag, at skúlin ikki hjálpir slíkum næmingum. Eg visti longu sum 12 ára gamal, at eg var samkyndur. Í staðin fyri at skapa fordómar, so átti skúlin at undirvíst soleiðis, at tað varð greitt fyri næmingunum, at vit eru ymisk og summi gerast samkynd.

– Tað átti at verið soleiðis, at vit fingu eitt skriftligt undirvísingartilfar um samkynd í fólkaskúlanum soleiðis, at tað ikki var upp til tann einstaka læraran, um hann vildi undirvísa í hesum ella ikki, men tað skuldi verið tvungið.

Um hetta verður tikið fram í Fólkaskúlanum, kann tað so ikki framskunda tilgongdina hjá næmingum, sum kanska eru eitt sindur til hina síðuna, tá skúlin sigur: »Tað er í fínasta lagi, ver tú bara samkyndur?«

– Nei, tað rokni eg ikki vit. Freud tosar longu í sínum kanningum í 40‘unum, at man er partvíst samkyndur og partvíst hinkyndur og tey flestu eru mest hinkynd. Tað tú er mest, tað fer tú altíð at royna at ganga ímóti. Tað eru nógv ung, sum hava roynt ella hugsa um at verið saman við báðum kynunum, men kensluliga so velir mann tað mann er mest til, tá mann blívur eldri, sigur Bogi Davidsen

## Syndari

Hevur tú ongantíð havt moralskar trupulleikar av, at tú er samkyndur. Hevur tú kent teg sum ein syndara?

– Nei, ikki syndara, ikki syndara, slett ikki sum syndara av teirri orsøk. Eg byrjaði sum ungur at lesa um eksistentialismuna og sá hvussu ymisk kristin lond fóru við sínum borgarum og tað sá eg einki kristið í tí. Sama var, tá eg sá stóran mismun verða gjørdan í ymiskum kristnum heimum, tað sá eg heldur einki kristið í. Eg veit nøkulunda, hvat tað er at vera kristin, eg komi frá eini kristiligari familju. Foreldrini hjá mær eru í fólkakirkjuni og nógv í familjuni eru knýtt til ymiskar sektir. Eg kenni stak væl ta kristnu læruna. Longu áðrenn konfirmatiónina var eg greiður yvir, at eg var eitt mikið gott menniskja, ikki betur enn onnur, men avgjørt ikki nakar ringur syndari.

*– Moralska grundarlagið hjá mær er gott. Eg eri uppvaksin við einari kristnari siðalæru, útbúgvingarliga er tað eisini í lagi, og eg eri líka góður sum øll onnur. Eg meini eisini, at øll onnur føroysk samkynd eru tað sama, uttan mun til útbúgving ella hvar tey koma frá.*

– Tá vit kjakaðust sum heilt ung, so hevði eg altíð hug at verja tey samkyndu. Eg var ikki vísur í, at eg var samkyndur, tí eg hevði lisið mær til, at um ein sum heilt ungur hevði betri hug á sama kyni, so kundi hetta broytast, tá ein nærkaðist teimu tríati. Tá eg kom til Danmarkar, fann eg út av, at tað eg hevði lisið mær til passaði ikki heilt. Mínar kenslur vóru soleiðis háttaðar, at eg var samkyndur. Eg hugsaði, eg skal ikki sita og pína meg við at halda, at eg var nakað annað, enn eg var. Eg hugsaði, at eg kom nógv betri frá tí við at viðganga, at eg eri tann eg eri, sigur Bogi.

## Rólant hjálpti

– Eg hevði tey fyrstu árini í Danmark tosað nógv við danskar samkyndar. Tá eg møtti Rólant, so lætti í. Tað var so befríandi at tosa um hetta á føroyskum. Eg haldi, at eg var við at finna upp á orðið samkyntur, sum síðan er broytt til samkyndur. Í Danmark kallaðu við okkum fyri bøssar. Tað var eitt negativt orð, og sum ikki samkynd høvdu funnið upp á og vit tóku tað til okkum fyri at vísa hvørjir vit vóru. Vit føroyingar, sum eru samkyndir, kalla okkum fyri geikarar. Tað er eitt orð, sum var ógvuliga niðursetandi, tá eg var barn. Men fyri at vísa hvørjir vit eru, so brúka vit hetta orðið kortini. Tað finnast eisini nógv onnur orð, sum eru kynslig orð um okkum, men tey brúki eg ikki sjálvur, hóast eg kenni tey, sigur hann

– Tað er hend ein broyting til tað betra fyri okkum samkynd. Broytingar henda líðandi, og eg eri vísur í, at lógin verður broytt einaferð í Føroyum, um tað verður í mínari tíð, veit eg ikki, men eg vóni tað.

## Vit goyma trupulleikar

– Føroyingar hava lyndið til at goyma trupulleikar í Danmark og so halda alt standa væl til. Nógv samkynd velja at búgva í Danmark, tí tey kenna seg ikki væl í Føroyum. Hvør minnist ikki hvussu sálarliga sjúk vóru burturflutt av landinum til Danmarkar í seinastu øld. Fyrst í seksti árinum komu hesi aftur og í dag hava vit eina vælvirkandi skipan innan psykiatri í Føroyum og tey veiku og brekaðu hava tað gott og liva undir mannsømiligum viðurskiftum.

– Vit hava lyndið til at gloyma landsmenn, sum ikki passa heilt inn í myndina. Hygg bara eftir teimum, sum bróta lógina. Tey sum verða dømd og fáa harðari revsing enn tríggjar mánaðar. Tey verða ofta flutt til fongsul í Danmark. Er nakað tilboð til tey aftaná lokna revsing heima í Føroyum, og fáa tey nakra hjálp. Um hesi koma heim aftur ella ikki aftan á at revsingin er sitin, so tykist tað, sum tað er líka mikið fyri føroyska samfelagið. Tey, sum eru send av landinum, vilja altíð sleppa heim aftur. Eg minnist ein føroying, sum var dømdur trý ára fongsul. Hann ynskti altíð at koma heim aftur og tað sama var við konuni, men hann tordi ikki. Tey lósu føroysku bløðini, lýsingarnar og hugdu í telefonbókina, bara fyri at síggja nøvnini á fólki tey kendu á skrift. Tey fluttu ongantíð heim aftur. Hevur ein havt tað gott í Føroyum, so vil ein altíð heim aftur, uttan mun til hvat ein hevur gjørt.

*– Tað vit samkyndu ynskja við skrásetta parlagnum er, at tey juridisku viðurskiftini eru í lagi. Vit vilja bara hava somu rættindi sum hini fólkini í samfelagnum. Tað eru tvær grundir til at fólk giftast. Onnur er at fólk eru góð við hvørt annað. Hin orsøkin er, at um ein verður skildur ella doyr, so er tað juridiska í lagi.*

## Einsamallir í Føroyum

– Ein onnur tungtvigandi orsøk til at føroyskir samkynd búgva í Danmark er, at teir eru so einsamøll í Føroyum. Tað finnast fleiri samkynd í stórum býum, sum eitt nú Keypmannahavn. Skal tú hava vinfólk, sum eru samkynd, so má tú fara har tey eru. Tá eg kom til Danmarkar og fann felagið fyri samkynd, so var tað ein deilig kensla, tí eg hevði sjálvur allar fordómarnar í heysinum. Tað at møta einum hópi at fólki, sum í mínum eygum vóru heilt almindilig, tað var deiligt, sigur hann

– Ein orsøk til, at eg ikki flutti heim aftur var, at eg møtti Søren. Um eg og Søren skuldu flutt til Føroyar, so hava vit knappliga ongar samkyndar at tosa við. Tað vil siga, at vit alla tíðina skulu ansa okkum, tá vit siga okkurt, soleiðis at vit ikki stoyta nakran. Í dag, tá vit eru saman við samkyndum vinfólki, so práta vit bara, vit kunnu gera grin við okkum sjálvum. Í Føroyum hoyrir tú ofta, vit vilja ikki hoyra um tykkara kynslív, vit tosa ikki bara um kynslívið, vit tosa um so nógv annað, men tað kann ikki umgangast, at vit tosa kjerligt um hvønn annan, eins og hjún og onnur pør tosa kjerligt um hvønn annan, og hetta tola nógv fólk ikki at hoyra, sigur Bogi Davidsen.